# Neyðugt at hava tey gomlu við

**Forkvinnan í sosialu nevnd hjá Tórshavnar Býráð, Katrin Dahl Jakobsen, heldur tað verða ógvuliga umráðandi at hava eitt eldraráð, sum kann takast við upp á ráð, tá ið avgerðir skulu takast á eldraøkinum**

ELDRAPOLITIKKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at hugskotið um eitt eldraráð í Havn er ikki spildurnýtt, tí tað var longu nevnt í eldraálitinum, sum bleiv gjørt í 1999. Tá var altjóða eldraár hjá ST, og í hesum sambandi var nokk so fitt gjørt burtur úr eldraøkinum, men síðani tá er ikki hent so nógv meira sambært Katrin Dahl Jakobsen.

### Sett í samgonguskjalið

Tá ið núsitandi býráðssamgonga í Havn gjørdist veruleiki tíðliga í ár, varð fest í samgonguskjalið, at eitt eldraráð skuldi fáast upp at standa.

- Tað hevur eisini nógv at siga, at tað er kommunan sjálv, ið hevur tikið stig til eldraráðið. Í Danmark er tað stjórnin, sum við lóg hevur kroyst eldraráðini oman yvir kommununar. Vit hava ístaðin sjálvi tikið stig til tað, og vit settu í hesum sambandi ein bólk av eldri fólk, sum gjørdi eitt uppskot til viðtøkur fyri eitt slíkt eldraráð, greiðir Katrin Dahl Jakobsen frá.

Forkvinnan í sosialu nevnd hjá Tórshavnar Býráð heldur, at um tað verður so, at kommunurnar skulu yvirtaka eldraøki frá landinum, so er tað ógvuliga umráðandi, at kommunurnar kunnu endurskoða økið saman við einum slíkum eldraráði, tí tá er best møguleiki fyri at rætta tað til eftir tørvinum hjá teimum gomlu, sigur hon.



*Katrin Dahl Jakobsen, forkvinna í sosialu nevnd, sigur, at eitt eldraráð kann gerast ógvuliga umráðandi í sambandi við avgerðir, ið skulu takast á eldraøkinum*

### Bert ráðgevandi

Í viðtøkunum fyri eldraráðið, sum arbeiðsbólkurin av eldri fólk hevur gjørt, stendur, at eldraráðið ráðgevur kommunustýrinum í øllum eldrapolitiskum spurningum og er bindilið millum teir eldru borgararnar og kommununa. Júst hetta leggur Katrin Dahl Jakobsen eisini áherðslu á:

- Eldraráðið er bert ráðgevandi, og tað kann ikki taka nakra politiska avgerð. Hinvegin kann tað geva okkum politikkarum viðkomandi upplýsingar og ráðgeving, tá ið avgerðir skulu takast viðvíkjandi teimum gomlu.

Júst hetta við viðkomandi upplýsingum og ráðgeving stendur eisini í viðtøkunum fyri ráðið Har stendur, at eldraráðið kemur við hugskotum og virkar fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gangnýtt.

Val verður til eldraráðið í Havn tann 29 novembur, og tað eru bert borgarar, sum hava fylt 60 ár valdagin, ið hava valrætt. Veljast skulu fimm limir og fimm varalimir. Tey, ið ætla at stilla upp til eldraráðið, skulu geva skrivlig boð um hetta í seinasta lagi 1. novembur kl. 16.00.

---

## Koyr dekkini á gistingarhús

Sum nakað nýtt bjóðar Dekksentrið í Havn viðskiftafólkum sínum at goyma dekkini fyri tey. Hetta nýggja fyribrigdi verður nevnt Dekkhotel, og tað er vanligt í teimum flestu av okkara grannalondum.

Leiðarin á Dekksentrinum, Rúni Lindberg, sigur, at tænastan gongur út uppá, at kundin kemur inn við bilinum, og tá ið summardekkini eru tikin av og vetrardekkini koyrd uppá, goymir Dekksentrið dekkini fyri kundan.

- Á henda hátt sleppur tú undan stríðnum at sleipa dekk til og frá verkstaðnum, og tú kanst sita í frið og náðum og fáa tær ein kaffimunn, meðan dekkini verða skift. Tað er eisini umráðandi, at dekk verða goymd undir røttu umstøðunum. Vit goyma tey í einum rúmi við hita, og tað er nógv betur fyri dekkini, enn um tey verða goymd í eini kaldari garagu, sigur Rúni Lindberg.

---

# Stór ókeypis konsert í Runavík

**Fríggjakvøldið um tvær vikur, t.v.s. tann 28 oktober, verður skipað fyri stórari ókeypis konsert í høllini í Runavík. Bólkarnir, ið fara at spæla, eru Týr, 200 og Lena. Konsertin er ein partur av mentanarvikuni, sum Runavíkar komm una skipar fyri**

KONSERT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mentanarvikan í Runavík verður fyriskipað í sambandi við, at vinnustevnan FaroExpo 2005 verður hildin í býnum í døgunum frá 25. til 27. oktober. Nógv mentanarlig tiltøk eru á skránni hesa vikuna, og stórfingna konsertin er so eitt av teimum.

### Skemt og mótasýning

Umframt teir tríggjar bólkarnar, ið fara at spæla á konsertini, verður eisini ymiskt annað undirhald.

Í pallskiftunum, t.v.s. tá ið skift verður frá einum bólki til ein annan, undirheldur Føroya besti skemtari, Hilmar Jan Hansen, og eftir konsertina verður almennur dansur við einum tí best umtókta tónleikabólkinum í landinum, Showmenn.



*Lena Anderssen verður bert eitt av trimum stórum føroyskum nøvnum, ið fara at spæla á ókeypis konsertini í Runavík tann 28. oktober*

Í tíðarbilinum millum konsertina og almenna dansin verður skipað fyri spennandi mótasýning, har handlarnir, Trendfloor og Shop-In, sýna fram nýggjasta mótan í einum tjaldi uttan fyri høllina.

Konsertin við Týr, 200 og Lenu byrjar klokkan 21.00 fríggjakvøldið 28. oktober, og atgongumerkini, ið sum áðurnevnt eru ókeypis, kunnu heintast á øllum deildum hjá Føroya Sparikassa frá komandi mánadegi. Atgongumerkini skulu avheintast persónliga, og nøgdin er avmarkað, siga fyrireikararnir.


HVÍTVØRUR

damor



LG mikroovnur
MS-1932
- 800 w maxeffekt
- 5 effektstig
- tekur 19 litrar
- Roterandi glastallerkur, 245 mm

798,-



LG V-cp243
Motoreffekt 1400 W
Posi ið tekur3 litrar
Teleskoprør
Nettovekt 3,9 kg

598,-



Blomberg uppvaskimaskina gun1580x

Super ljóðleys - 47dB
Sensor stýring
vísir hvussu leingi er eftir
ventilatorturking
Programvisning í skerminum
Hæddarjusterbør yvirkurv
Multifunktiónsbakki
Fløskuhaldari
Metalfilter
Kann vaska við fleiri temperaturum í senn

5998,-

Gorenje eymhetta DU600w



- 60 cm breið
- Sýgur 300 m3/t
- 15 cm høg

498,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor